# Ársaðalfundur í P/F BankNordik, hósdagin 26. mars 2020

BANKNORDIK

2. mars 2020

**<u>Uppskot frá partaeigara Kim Pedersen – dagsskrá pkt. 3 a:</u>**

**Uppskot um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapi fyri 2019**

3.a. Uppskot frá partaeigara Kim Pedersen

*Í staðin fyri at útgjalda fráboðaða vinningsbýti fyri roknskaparárið 2019 verður - vísandi til verandi lága lutfall millum kurs og innara virði - mælt til at samsvarandi upphædd verður nýtt til keyp av egnum partabrøvum. Treytast skal at hetta afturkeyp av egnum partabrøvum verður framt innan árslok 2020, og soleiðis at hetta kann fremjast í samsvar við galdandi kapitalkrøv bankans. Herumframt skal keypið av egnum partabrøvum fara fram til kursir, ið sambært nevndini eru at meta sum lagaligir. Til onnur avgerð verður tikin, skulu keyptu partabrøvini liggja í bankans egingoymslu.*

*Svar nevndarinnar:*

*Á aðalfundinum í 2019 fekk bankin longt verandi heimild til nevnd bankans at keypa egin partabrøv, soleiðis at henda heimild er galdandi í tíðarskeiðnum fram til 1. mars 2024. Talan er um eina rammuheimild. Sostatt skal bankin í hvørjum einstøkum føri søkja Fíggjareftirlitið um loyvi til keyp av egnum partabrøvum undir hesi rammu. BankNordik hevur sostatt ikki lógarheimild til at keypa egin partabrøv uttan at Fíggjareftirlitið frammanundan hevur givið loyvi til tess.*

*Herumframt skulu afturkeyp av egnum partabrøvum fara fram í samsvari við galdandi lóggávu á økinum.*

*Vísandi til galdandi lóggávu á økinum hevur bankin ikki lógarheimild til ella møguleika fyri at brúka upphæddina, sum er í uppskoti at útgjalda sum vinningsbýti fyri roknskaparárið 2019, til keyp av egnum partabrøvum innan árslok 2020. Tískil er ikki gjørligt at fremja hetta uppskot í verki.*

*BankNordik er tilvitaður um at nýta afturkeyp av egnum partabrøvum sum ískoyti til rindan av vinningsbýti, og ynskir bankin í tann mun tað við atliti til lóggávu og kapitalstøðu bankans er gjørligt, at nýta keyp av egnum partabrøvum sum ískoyti til rindan av vinningsbýti. Afturkeypini av egnum partabrøvum sum bankin hevur framt seinastu árini eru dømi um hetta. Ætlanir bankans um at nýta afturkeyp av egnum partabrøvum sum ískoyti til rindan av vinningsbýti eru eisini orsøkin til at bankin á aðalfundinum í 2019 fekk longt verandi heimild til nevnd bankans at keypa egin partabrøv.*

*Nevndin tekur tískil ikki undir við hesum uppskoti.*

**Nevndin**